Lívdin
- í lívd hins hægsta

Desember 2007



# Christmas Child 2007



*Krista Áargarð og lítla Hjørdis Maria taka ímóti pakkunum, sum fóru til Kirgisistan, sum fyrr var partur av Sovjet.*

Vit hava nú savnað skógvaeskjur inn í sambandi við Christmas Child tiltakið fimm ár á rað. Inn komu í ár umleið 3000 eskjur eins og bæði í 2006 og 2005. Eskjurnar fóru við Eimskipum til Onglands, haðani tær fara til Eystureuropa.

Tað er sera lívgandi og eggjandi, at áhugin er so stórur ímillum kirkjur, samkomur og onnur at vera við at stuðla. Vit hoyra ferð eftir ferð, at fólk eru so glað um at kunna geva − og tá ið tey so síggja, at tað ger mun, og at gleðin er so stór hjá barninum, ið fær eina gávu, so er gleðin at geva enn størri.

So ein hjartans tøkk til øll, ið hava givið. Harrin signi tykkum ríkliga!

*Lívdin*

## Røkka út til tey einsligu

Í jólamánaðinum verða vit øll mint á at hugsa um onnur. Jákup skrivar í brævi sínum 1:27: „Rein og lýtaleys gudsdýrkan fyri Gudi og Faðirinum er hetta: At vitja faðirleys og einkjur í trongd teirra og at halda seg ódálkaðan av heiminum.“

Eg fari at heita á samkomuna um at minnast tey gomlu og einsligu henda mánaðin. Tað eru mong gomul, sum sita einsamøll heima stóran part av tíð síni. Onnur gomul búgva í sambýli ella á ellisheimi. Tað eru eisini mong onnur í samfelagi okkara, sum eru einslig, hóast tey hvørki eru gomul ella óarbeiðsfør. Mong ung eru eisini sera einslig. Nógvan stakar mammur eru sera einsligar og hjálparleysar við smáu børnum sínum.

Latið okkum á ein serstakan hátt røkka út til teirra henda mánaðin. Tosið saman í húsbólkunum og tænastunum um, hvussu tit kunnu vera við at røkka út til onnur henda mánaðin, og lutið síðani við samkomuna, hvat tit vilja gera, soleiðis at øll samkoman kann vera við!



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

### Poul Guttesen aftur í Føroyum

Poul Guttesen er nú eftir mong ár uttanlands komin aftur til Føroya. Vit hava hoyrt hann tala í Lívdini, og eisini hevur samrøða verið gjørd við hann (hon kann takast niður á heimasíðuni). Ætlandi fer Poul at boða Orðið og læra runt landið, og virkisøki hansara fer eyðvitað at vera nakað fjølbroytt.



*Poul Guttesen*

Poul Guttesen hevur lisið gudfrøði í USA og Kanada og síðani gjørt eina Phd. ritgerð í gudfrøði í Skotlandi. Seinastu árini hevur hann undirvíst í gudfrøði á „Schloss Mittersill“ í Eysturríki. Tað er gott at hava Poul ímillum okkara aftur.

### Bøn fyri myndugleikunum

Judy og Óli á Grømma Jacobsen hava verið í Føroyum í okkurt um ein mánað og hava vitjað samkomur, m.a. Lívdina. Óli eggjaði serliga til bøn fyri myndugleikunum, soleiðis at evangeliið kundi hava framgongd allastaðni, bæði her heima og úti í heimi. Hann vísti til 1. Tim., har okkum verður álagt at biðja fyri myndugleikunum, hvørt vit eru samd við teimum ella ikki.

Óli hevur í mong ár verið leiðandi í aðalnevndini hjá New Tribes Mission við høvuðssæti í Florida og hevur ferðast kring knøttin, har hann hevur eggjað samkomum og trúboðarum í verkinum at boða evangeliið. Vit gleddust um at hava samfelag við tey bæði.



*Óli á Grømma*

### Hoyvíkar kirkja vígd

Sunnudagin 4. november varð Hoyvíkar kirkja vígd. Sannur hátíðardámur eyðkendi vígsluna, og meira enn túsund fólk vitjaðu kirkjuna hendan dagin.

Grundarsteinin til kirkjuna løgdu Margretha drotning og Heindrikur prinsur tann 20. juni 2005. Innskriftin er úr 5. Mósesbók 33,27: „Bústaður er hin ævigi Guð, og her niðri eru hinir ævigu armar.“

Pláss er fyri 638 fólkum í kirkjuni, sum kostaði 46 milliónir krónur at byggja.

Vit ynskja byggiharranum, Tórshavnar Eystara Kirkjuráði, og kirkjufólkinum í Hoyvík hjartaliga tillukku og Harrans signing við stásiligu kirkjuni, sum er eitt prýði fyri umhvørvið í Hoyvík.



*Hoyvíkar kirkja*



## 20 doypt á Zarepta

Sunnudagin 4. november vórðu 20 fólk í Lívdini doypt á Zarepta. Tey vóru:
Regin Nolsøe, Hjørtur Nolsøe, Dávid Nolsøe, John Petersen, Andrias Rudolfsson, Jónas Rudolfsson, Bjørg Viderø Johannesen, Karl Andrias Stórá, Rannvá Thorsteinsson, Martin Nielsen, Brynja Rasmussen, Bjørg Krett Hansen, Jenny Viderø Gunnarsson, Daniel Syderbø, Ragnar Isaksen, Jean Alex Miné Midjord, Benjamin Miné Midjord, Kristina D. Jarnfoss, Birgit Øssursdóttir Nielsen og Kristina Arge.

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli** **týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 4. des. | Skeið 201: Andalig búning – Hvussu eg lesi Bíbliuna (Jógvan Z.) |
| 11. des. | Skeið 201: Andalig búning – Hvussu eg biði (Jógvan Z.) |
| 18. des. | Húsbólkar |
| 25. des. | Einki møti (jóladagur) |

## Skeið í Lívdini

**»Trin 2: Andalig búning«**

Týsdagarnar 4. og 11. desember kl. 20.00-21.30 verður skeiðið „2. trin: Andalig Búning“ hildið í hølunum á Brekku. Hetta er annað skeiðið av fimm grundskeiðum, sum Lívdin bjóðar.

Av tí at skeiðini byggja á hvørt annað, er tað ein fyrimunur fyrst at hava tikið skeiðið „1. trin: Samkomulív og samfelag í Lívdini“, hóast hvørt trin er eitt sjálvstøðugt skeið.

**Endamálið**

Dentur verður lagdur á nakrar vanar, sum øll trúgvandi mugu fáa fyri at kunna vaksa og búnast andaliga. Nomið verður við tað, sum skal til fyri at fáa hesar vanar, eins og lært verður at brúka tey amboð, sum eru neyðug fyri at halda fast við hesar vanar.

## Parkering við Hoyvíkar skúla

Nú gudstænasta er í Hoyvíkskirkjuni sunnudag kl. 11, samstundis sum vit hava møtir í skúlanum, hevur rættuligur parkeringsruðulleiki verið á Kirkjustræti. Hetta kann elva til ørkymlan, bæði fyri grannar og kirkjufólk, og tí heita vit á fólk í Lívdini um at ansa serliga væl eftir, hvussu bilurin verður settur. Best hevði verið, um bilarnir vórðu settir á parkeringsplássini í skúlagarðinum, við frítíðarskúlan, rundan um Hoyvíkshøllina ella við vestaru inngongdina móti Vegnum Langa. Tað ber eisini til at seta bilin við Dagstovnin í Hoyvík og við MBM (vit hava fingið loyvi frá MBM).

## Innsavning til russar

Aftur í ár fara vit at savna jólapakkar til russar, sum eru umborð á skipunum, ið liggja úti á redini. Lív Clementsen syrgir fyri, at pakkarnir koma umborð á russisku skipini.

Í pakkarnar skal leggjast ein lutur úr hvørjum av hesum bólkum:

1. Vøttir, hosur ella okkurt tílíkt plagg
2. Hárshampoo, tannbust og tannkrem, kropslotion o.t.
3. Okkurt søtt, so sum sjokulátapláta ella karamellpakki

Haraftrat skal ein russisk traktat við í pakkan. Tær fáast við at venda sær til Lív Clementsen, tlf. 316714 og 215121.

Av tí at pakkarnir kunnu skrædna undir flutningi, verður rátt til, at gávulutirnir verða lagdir í ein plastposa, áðrenn teir verða pakkaðir inn. Harvið skuldi einki dottið úr pakkanum, um hol kemur á hann. Pakkarnir skulu antin latast Lív Clementsen heima við hús í Onnugøtu 7 ella takast við í Lívdina áðrenn jól.



## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla



Sonni



Jógvan



Poul

### Sunnudagin 2. desember

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Opið evni*
*Talari: Sonni Poulsen, trúboðari*
*Prát við Ólav og Ásu & Paula og Duritu*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (3)*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 9. desember

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Yndissangir*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (4)*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 16. desember

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Sunnudagsskúlabørnini framføra*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (5)*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 23. desember

Jólahugni kl. 12.00-13.00 *Samfelagsløta eftir møtið*

### Sunnudagin 30. desember

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Sjónvarpsmøti (Poul Guttesen talar)*
*samfelagsløta eftir møtið*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Útisetar luttaka*

* Ungdómsmøti er fríggjakvøld kl. 21 í Hoyvíkar skúla

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*